## Arctic Line avlop

Grønlendska reiðaríið Royal Arctic Line A/S hevði eitt gott ár í fjør. Roknskapurin vísir, at avlopið var 58 mió. krónur aftan á skatt, og tað var heilar 42 mió. krónur meiri enn í 2005. Umsetningurin í fjør var 752 mió. krónur ella einar 25 mió. krónur størri enn árið fyri. Um orsøkina til framgonmgdina sigur Royal Arctic Line, at farmurin vaks sjey prosent í 2006, og at flutningurin millum havnirnar í Grønlandi vaks heili 26 prosent í fjør.

## Stórur prísmunur

Tann, sum ætlar sær at tryggja ein bil í Danmark, skal leita eftir tí rætta felagnum, tí tað ber til at spara fleiri túsund krónur um árið í tryggingargjaldi, skrivar Ekstrablaðið. Ein kanning hjá blaðnum vísir, at ein nýggjur bilførari, sum tryggjar bil fyrstu ferð, kann spara túsundtals krónur um árið. Eitt nú kostar tað einum 18 ára gomlum 49.000 krónur at tryggja ein Toyota Avensis hjá felagnum If. Hjá felagnum Alka kostar tað 19.000 krónur.

Formaðurin í FF um útlendskar fiskimenn:

# Skulu ikki behandlast sum trælir



*- Tað má á ongan hátt enda við, at føroyskir fiskimenn sita heima, tí okkara skip eru mannaði við útlendskum fiskimonnum, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Eg kundi hugsað mær, at útlendsku fiskimenninir hava eina lønarkonto her heima, eins og teirra frítíðarløn varð flutt á konto í Føroyum, sum gjørt verður hjá øðrum føroyskum fiskimonnum. Tá høvdu vit sæð, at útlendsku fiskimenninir fáa ta úrtøku, teir eiga, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard**

ARBEIÐSMEGI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt av málunum, tá fundur verður í stjórn Føroya Fiskimannafelags um eina góða viku ella so, fer helst at snúgva seg um útlendskar fiskimenn umborð á føroyskum fiskiskipum.

Tað sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Hann heldur, at neyðugt er taka hetta málið upp í felagnum, nú tað er ein veruleiki, at nøkur føroysk reiðarríir leita eftir útlendskum fiskimonnum, tí tey siga seg hava trupulleikar við at manna skipini.

### Einki mál

Jan Højgaard sigur, at síðan hann gjørdist formaður í FF, hevur einki mál um útlendskar fiskimenn verið til ummælis hjá felagnum, og hann sigur seg einki vita um, at felagið yvirhøvur hevur havt nakað slíkt mál til ummælis.

Í samrøðu við Sosialin í síðstu viku, helt Háldan Haldansen, reiðari á línuskipinum Gullbergi, sum nú hevur tveir póllendingar umborð, at málið um hesar menn hevur verið til ummælis hjá FF.

Tað kann so hava verið undan formanstíðini hjá Jan, ið sum kunnugt ikki byrjaði fyrr enn 1. februar í ár.

- Nei, eg veit einki um, at FF formelt hevur fingið eitt slíkt mál til ummælis, men vit í stjórnini hava leystliga og óformelt tosað um viðurskiftini, sum vit fara at venda aftur til á komandi stjórnarfundi.

Jan væntar, at næsti stjórnarfundur í felagnum verður um eina góða viku ella so, men tá ið vit tosaðu við hann í gjár, var dagurin ikki endaliga ásettur.

### Vísa varsemi

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag heldur, at føroyingar sum útgangsstøði eiga at vísa varsemi við at taka útlendska arbeiðsmegi heim til Føroya.

- Tað má á ongan hátt gerast soleiðis, at føroyskir fiskimenn sita heima, tí skipini eru mannaði við útlendskum fiskimonnum.

Annað er, sigur Jan Højgaard, at hann sum formaður í FF hevur sítt skepsis við teimum treytum, sum útlendsku fiskimenninir í Føroyum sigla undir.

- Reiðarin, sum nú hevur fingið tveir póllendingar umborð, sigur, at menninir sigla undir júst sama sáttmála sum føroyskir fiskimenn, men eg kundi væl hugsað mær, at vit sóu, hvagar peningurin, teir forvinna, fer. Vit kundu eisini hugsað okkum at sæð, at teir hava eina lønarkonto her heima, eins og teirra frítíðarløn varð flutt á konto í Føroyum, sum gjørt verður hjá øðrum føroyskum fiskimonnum.

### Umsitingin?

Hann leggur aftrat, at FF fer at krevja, at útlendingar, sum sigla við føroyskum fiskiskipum, sigla undir sama sáttmála sum føroyingar - og at teir arbeiða undir somu treytum sum okkara fiskimenn.

*Men hevur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag so ikki alit á, at reiðarin rindar monnunum tað, teir eiga?*

- Jú, tað skal eg ikki siga, at hann ikki ger, men tað, eg seti spurnartekin við, er, hvussu nógv fer burtur av hýruni, tá ið saman um kemur. Hvat skulu teir, sum umsita hesar menn og hava teir siglandi her heima, hava fyri sítt arbeiði? spyr Jan Højgaard.

### Eymur spurningur

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag vísir á, at útlendsk arbeiðsmegi í Føroyum sum heild er ein eymur og viðbrekin spurningur.

- Nú sigi eg ikki, at her verður »handlað« við fólki, men vit vita, at handil er vorðin kendur um ein stóran part av heiminum. Í hesum førinum verður handlað við



*- Um fiskimenn støðast umborð á einum skipi ella ikki, hongur eisini saman við, hvussu fólkið verður viðfarið, heldur Jan Højgaard*

*Mynd: Rógvi Mouritsen*